VINNU SÍÐURNAR
VINNA HANDVERK HANDIL

Nr. 194 • mikudagur • 12. oktober 2005 • 79. árgangur • www.sosialurin.fo




Nýggj býarmynd í Havn:

# Frá at elta breyð til at mýkja vøddar

**HANDILSLÍV**
*Jan Müller*
*Jan@sosialurin.fo*
*Myndir Jan Müller*



*Hesi fimm fara at ganga viðskiftafólki til handa*

Fríggjadagin kom nýtt lív í aftur ein part av Havnini, har tað hevur verið øskukalt leingi. Tó ikki soleiðis at skilja, at hiti er komin í aftur stóra bakaraovnin á bakarínum hjá Conrad Skaale og Palle Bager. Tíðir skifta. Nú er tað ein heilt nýggja vinna, sum hevur latið upp dyrnar í hesum gamla bakarahandlinum. Ergo og Hjálpartól hava nútímansgjørt hølini í J.C. Svabosgøtu 6.

Hølini hava staðið so gott sum óbrúkt í meira enn 30 ár. Tá Conrad Skaale doyði 1974 endaði eisini eitt kapittul í føroyskari bakarísøgu. Nú er so aftur lív í á hesum sera eyðsýnliga og kenda gøtuhorninum. Ergo og Hjálpartól, sum keyptu ognina og hava umvælt hana til endamálið, hevði móttøku í nýggju og rúmligu hølunum fríggjadagin. Í tíðindakrivi siga nýggju eigararnir, sum hava varðveitt gamla ovnin, at ístaðin fyri at elta breyð har verða nú vøddar mýktir í tí framkomna "Relax rúminum ", har fýra av heimsins mest framkomnu massagustólum finnast. Umframt handil húsast har viðgerðarstova við ergoterapi, sansarúm og relaxrúmi. Á 1. hædd er fundar- og undirvísingarhøli. Fimm fólk fara at starvast hjá Ergo og Hjálpartól. Stjóri er Beinta Lassen, ergoterapeutur.





*Tey hava dugað at varðveitt tað gamla*



*Tilsamans fýra av hesum framkomnu stólum eru til taks*